


# SIC til Grikkalands

KONSERTFERT

*Eyðun Müller Thomsen*
*eydunnudye@hotmail.com*

Seinastu tíðina hevur bólkurin SIC ikki verið so nógv at síggja til. Men man kann róliga siga, at nógv hevur verið at hoyra um bólkin.

USA, Ísland, Australia, Holland og Týskland hava øll ligið framvið og hildið eldin í SIC hesa seinastu tíð.

Í gjár bleiv so kunngjørt, at bólkurin skal til Athen í Grikkalandi.

Talan er um dagarnar frá 20-25. November, har ein konsert við SIC verður á mest vælumtókta rocksalinum í Athen 'Underworld', sum er nakað heilt fyri seg. Listamaðurin aftanfyri fløguhúsan hjá SIC, Seth Siro Anton hevur designað spælistaðið við síni sermerktu list.

Dagin eftir konsertina eru tveir langir arbeiðsdagar at síggja fram til.

Lagið frá SIC, 'Rosegarden In Hell' verður gjørt til sjónbandalag. Og aftur her stendur ein sera áhugaverdur maður aftanfyri produktiónini.

# Føroysku/íslendsku Bloodgroup geva fløgu út

**Føroyski og íslendski elektro/pop tónleika-bólkurin, Bloodgroup, gevur fyrstu fløgu sína, Sticky Situation, út í dag 7 novembur, á føroyska og íslendska marknaðinum**




NÝGGJ FLØGA

*Sámal Rasmussen*
*samal84@gmail.com*

Bólkurin er í dag ein av mest aktuellu og væl umtóktu tónleikabólkunum í Íslandi, og er mannaður av føroyska Janus Rasmussen, annars kendur sum front figur í vælumtókta føroyska rútmiska tónleikabólkinum, Lama Sea, og nýðliga sum DJ undir navninum, Djór, og damu hansara, Lilju, og báðum beiggjum hennara, Hallur og Raggi. Tískil markabra navnið Bloogroup (Blóðbólkur).

Tónleikurin sveiggjar frá tí pumpaða, ið dregur ein út á dansigólvið at rista rumpuna, til onnur meira friðalig fashion løg, men er altíð elektriskur, modernaður og popputtur.

Bólkurin hevur verið til í meira enn eitt ár, og spældi millum annað á størsta íslendska tónleikafestivalinum, Airwaves, bæði í ár og í fjør, og so hava tey kort síðani verið á konsertferð í New York og Berlin, har tey spældu fleiri konsertir bæði støðini, og enntá á største bransju festivalinum í Týsklandi, Popkomm, har bæði Eivør og Teitur hava spælt áður. Hesin festivalur líkist nógv tí smærra danska SPOT festivalinum, ið fleiri onnur føroysk nøvn hava spælt á eftir hondini.

Fløgan hevur verið at fingið í online tónleikahandilinum, Itunes, síðan 5. novembur, og er upptikin í fleiri ymsum hugnaligum húsum, ið Bloodgroup leigaðu eitt vikuskifti í senn, og settu fyribilsstudio upp í. Hon er miksað í Síld Studios og Sýrland Studios Reykjavík, og er mastrað av Guy Davie, frá The Exchange í London.

Fleiri løg av fløguni eru at hoyra á Myspace síðuni hjá Bloodgroup: www.myspace.com/bloodgroup

# Stórfingin tónleikaløta í Norðurlandahúsinum



*Jóhannes Andreasen*

UMMÆLI

*Ólavur Hátún*

Í seinastu viku kom mær fyri oyru, at okkara fremsti klaverleikari Jóhannes Andreasen skuldi hava konsert í Norðurlandahúsinum leygardagin.

Dagurin reis við góðveðri, sum mentist alt meira út á fyrrapartin. Spakur streymur var, og tí kom eg í ta tvistøðu: skal eg fara á flot ella skal eg halda meg heima at lurta eftir Jóhannesi? Sjógvurin dró, og føgur var løtan í fjørðinum, men heppið var valið at leita betíðs aftur til lands, tí ikki haldi eg meg hava upplivað slíkt tónleikabragd av føroyskum hondum sum tað, ið untist okkum fáu áhoyrarum, ið vóru møtt.

Hóvliga varð lagt fyri við sonatu eftir Joseph Haydn – yndisligur tónleikur, sum fjálgandi streymaði inn í sál og sinni. Tey "Fimm klaverstykkini", opus 3 hjá danska tónaskaldinum Carl Nielsen, bóru okkum við sínum skiftandi lag víðari í hesum fólksliga partinum yvir í gitnu "Arabeskuna" eftir Robert Schumann.

Eftir hesa klassisku fagnarløtu í fyrra parti hevði Jóhannes okkum brádliga frammi í nútíð og heimasjógvi við "Ælaveðri" hjá Paula í Sandagerði.

Við Paula hendi eitt skifti í føroyskari tónlistarsøgu. Eftir at songløg hjá J. Waagstein, Peturi Alberg, Óla Jákup Hansen, Hans J. Højgaard og fleiri øðrum í áratíggir høvdu myndað føroyskan tónleik, kom her fram ungur maður, sum ikki bert skrivaði songløg og kórsatsir í samtíðarsniði, men sum var fyrsta føriska tónaskaldið, ið veruliga hætti sær undir orðleysan, instrumentalan tónleik. "Ælaveður" er eitt av mongum dømum um hansara ríku og fjølbroyttu listargávur.

Næsta á skránni var nýtt tónaverk (2005) hjá íslendska tónaskaldinum Atla Heimir Sveinsson. "Sanctus" var heitið, ið tóktist boða frá innhugsnari friðsælu. Soleiðis spakførir ljóðaðu eisini teir fyrstu tónarnir út í rúmið. Men eins og megnar fugur J.S. Bachs mentist verkið, í støðugum dynamiskum skifti millum ørveikasta pianissimo og gjallandi fortissimo, til eitt satt dómadags harðveður. Vit hava áður upplivað Jóhannes Andreasen í krevjandi leiklutum, bæði tulkandi nútíðar tónleik og í klassiskum uppgávum sum solist t.d. í klaverkonsert eftir Beethoven. Men ongantíð tykir mær at hava hoyrt hann lata so upp fyri sínum tónlistarliga førleika sum hesa løtuna í Norðurlandahúsinum, ið veruliga dró fram kenslur og minnir um serstakar solistupplivingar í konserthallum uttanlands í yngri árum.

Eisini til seinast í gitnu "Scherzoini" eftir Chopin staðfesti Jóhannes Andreasen seg sum pianist á altjóða stigi.